

# Garvill gudstænasta

**Heini Lützen hevur um nakar annar myndað føroyska kristna tónleikin tey síðstu mongu árini. Á ársins Summarfestivali framførdi hann á stóra palli**

Óli Jákup Jacobsen

"Hetta skal ikki vera nøkur konsert," legði Heini út við at siga, "hetta skal meira síggjast sum ein gudstænasta."

Og tað var tað. Heini framførdi nógvar av sálmunum, sum hann nýliga hevur givið út á fløgu. Ikki man tann vanligi kirkjugangarin tó hava kent sálmarnir serliga væl aftur, sum teir vórðu framførdir av kristna rockkonginum í Føroyum.

Heini sang sublimt. Hann rakti hvønn einasta tóna klokkureint, hóast teir vórðu so høgir, at man fór at skelva í knøunum. Tónleikararnir spældu eisini heilt ótrúliga væl, har teir allir samlir kunnu teljast millum Føroya bestu.

Antin dámar man hesar nýggju sálmarnar, ella ger man ikki. Sjálvur saknaði undirritaði eitt sindur av stílvariatión, tá allir sálmarnir vórðu framførdir nokk so eins. Burtursæð frá tí hevði Heini eina ótrúliga flotta og musikalskt geniala konsert.

# TAÐ ER LÍÍÍV OG FEST – ROCK'N ROLL ER BEST!

**Tað var ein ordans rockkonsert, sum trøllini úr Klaksvík borðreiddi við á Vágsbøi**

Óli Jákup Jacobsen

Vágsbøur var hálvfullur, og veðrið var avberað gott. Lýtt, turt og ikki eitt lot í luftini, so fyritreytirnar fyri eini góðari framførslu vóru til staðar. Og tað varð tað eisini.

Trøllapætur, Trøllaomman og ikki minst tann garvilla Ommudidd hoppaðu, dansaðu, sungu og rockaðu frá byrjan til enda. Hetta merktist á børnunum, sum vóru fult upptikin av at syngja við, koyra hendur upp og svara aftur, tá trøllini vendu sær til børnini.

Ikki bara børnini lótu seg undirhalda. Tey vaksnu vóru næstan líka nógv undirhildin. Fá mundu tey vera, sum ikki ruggaðu eitt sindur, tá trøllini sungu sínar lívligu sangir.

Tað einasta kritikpunktið er, at framførslan var alt ov stutt, einans hálvan tíma. Nógv av børnunum vóru ikki meira enn komin, so var liðugt. Ein tími hevði ikki verið ov lítið.



# Fólkið sang við Una

**Plaseraður millum rockutu The Dreams og hart rockutu Synarchy hevði Uni Arge eina hugnaliga og róliga framførslu í Føroya tele teltinum.**



Óli Jákup Jacobsen

Veðrið var sera gott, tá Uni við síni mildu rødd sang sínar kendu sangir á summarfestivalinum. Heilt fitt av fólki var eisini samankomið, helst komin beinleiðis yvir frá konsertini hjá The Dreams.

Uni spældi sangir frá báðum sínum útgávum. Umframt tey vanligu ljóðførini hevði Uni ein trompetblásara við sær. Tað riggaði serstakliga væl, tá tað gav ein livandi og hugnaligan café-stemning.

Tá Uni sang síðsta sangin hjá sær "Býarmynd", sang fjøldin við – ella partur av henni, ið hvussu so er. Eftir tann sangin var tíverri ikki pláss til nakað eykalag, tá Synerchi, sum vóru næstir á skránni, vóru longu byrjaðir.

Í stuttum var talan um eina hugnaliga framførslu.

# Ja, teir liva enn í 80unum

**Men tað er eftir øllum at døma har, fólkið vil hava Eyðun og Terja**

Óli Jákup Jacobsen

Flags Tjaldið var kjokkfult av glaðum festivalgestum, tá Eyðun og Terji skuldu á pall. Tað er ikki heimsins lættasta uppgáva at halda fram, har Westlife slepti, men tað løgdu Eyðun og Terji einki í.

Terji dugdi sjálvur at síggja, at teir ikki vóru nakrir Westlife, men segði so: "Vit skriva um ikki annað okkara egnu sangir." Undirritaði ivast í, um tann ungi áhoyraraskarin fremst við pallin skilti Terjasa viðmerking, men satt var tað. Eyðun og Terji syngja í mun til Westlife sínar egnu sangir. Og fólkið elskar teir.

Tað er torført at skriva nakað, sum ikki longu er skrivað um føroysku poplegendurnar. Teir leveraðu precis tað, sum man væntaði, og tað var tað. Duoin sang væl, og megnaðu teir sum einki at fortseta kann góða stemningin frá Westlife.

**Meira frá Summarfestivalinum verður í blaðnum fríggjadagin**